# Framtíðarinnar træklædningur fæst nú í Føroyum

**BYGGITILFAR**
*Tíðindaskriv*

Sp/f Byggitilfar umboðar, sum fyrsta fyritøkan í Føroyum, nýggja viðin Superwood.

– Tað, ið sermerkir henda viðin er, at hann er gjøgnum impregneraður á ein slóðbrótandi og umhvørvisvinarligan hátt – júst tað rætta til føroyska bygging, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Grundað á serviðgjørda viðin verður Superwood eisini rópt “framtíðarinnar træklædningur”.

Viðurin fæst bæði sum klædningsbrettir og sum stórviður í ymsum støddum og profilum.

- Superwood er norðurlendskt granntræ, ið er viðgjørt við eini serligari hátrýsttøkni, ið impregnerar uttan at brúka tungmetall og uttan at leiva lívrunnin loysievni í trænum, siga Harald W. Knudsen og Dánjal Pauli Mohr eigarar av sp/f Byggitilfar.

Umframt at viðurin er umhvørvisvinarliga framleiddur gevur henda nýggja tøknin eisini hópin av praktiskum fyrimunum. Tað er ikki nevðugt at turka viðin eftir viðgerðina, og hetta ger, at hann ikki er so tungur sum impregneraður viður vanliga er og er tí eisini nógv lættari at flyta og at arbeiða við.

Av tí at viðurin er turrur, kann hann eisini málast beinanvegin. Ikki er neyðugt at grunda viðin fyri at verja móti roti og soppi áðrenn málað verður, tí hann er gjøgnumimpregneraður við soppadrepandi fungicid heilt til kjarnuna.

Umhvørvisliga er talan um eitt risalop framá, og tað merkir millum annað, at Superwood – í mun til vanliga impregneraðan við – kann burturbeinast sum heilt vanligt brennbært burturkast.

– Staðfestast kann at, Superwood á allar mátar er “framtíðarinnar træklædningur”, og vit eru errin av at verða tey fyrstu, ið kunnu bjóða hetta umhvørvisvinarliga tilfarið í Føroyum, siga Harald W. Knudsen og Dánjal Pauli Mohr at enda.



## 100 ára gamli Theodor kemur komandi vikuskifti



**Orsakað av kommunuvalinum er nógv tilfar, sum má bíða til komandi viku. Millum hetta tilfar er ein áhugaverd samrøða, sum Óli Jacobsen hevur havt við 100 ára gamla Theodor Thomassen úr Sørvági. Hon kemur í komandi vikuskiftisblaði**


Fish Expo Faroes 2009
27. – 29. mai, 2009 Gundadalur, Tórshavn

Størsta vinnutiltak í Føroyum
– har føroyska vinnan hittir altjóða vinnuna

SENDISTOVAN

Sigmundargøta 34 • FO-100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel +298 30 80 30 • Fax +298 30 80 31 • info@fex.fo • www.fex.fo